# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Allir trúgvandi pakistanar eiga at fara í heilagt kríggj ímóti teimum, sum søktu av Reyðu Moskuni*

*Ayman al-Zawahiri*

# Stríð um Útnyrðingsleiðina

**Kanada hevur gjørt av at senda skip at hava eftirlit við sjóøkinum við Norðpólin. Nú sigur USA, at tað fer at gera tað sama**

*Bæði Kanada og USA vilja hava eftirlit við teimum arktisku havleiðunum, nú ísurin hvørvur*




Havøkið norður ímóti pólinum er vorðið áhugavert, nú ísurin minkar, og tað ber til at sigla ígjøgnum ta sokallaðu Útnyrðingsleiðina úr Atlantshavinum í Kyrrahavið. Men økið hevur eisini annan áhuga, tí hildið verður, at ovurstórar nøgdir av olju og gassi kunnu vera undir havbotninum á hesum leiðunum.

Fyrradagin segði kanadiski forsætisráðharrin, Stephen Harper, frá, at stjórnin hevur gjørt av at byggja átta sjóverjuskip, sum skulu hava eftirlit við havøkinum norðan fyri kanadisku strondina. Men tey verða ikki einsamøll.

- Amerikanski herflotin má vísa seg meiri í tí arktiska økinum. Vit eiga at byggja fleiri skip til endamálið, nú tað gerst alt meiri týðiligt, at ísurin har bráðnar skjótari, enn vit hava hildið, segði amerikanski admiralurin Timothy McGee á einum tíðindafundi í Washington í gjár sambært Bloomberg-tíðindastovuni.

Ovastin fyri amerikonsku sjóverjuni, admiralurin Brian Salerno, nam á tíðindafundinum við tað stóra ríkidømið, sum kanska er undir havbotninum í tí arktiska økinum.

- Kanska er ein fjórðingur av allari heimsins olju undir havbotninum har, so hetta økið eigur at koma við í okkara orkuætlanir, og vit eiga at taka neyðug stig, segði admiralurin.

# Lady Bird Johnson deyð



**Einkjan eftir amerikanska forsetan Lyndon B. Johnson doyði í gjár**

Lady Bird Johnson búði í býnum Austin í Texas, og hon doyði í heiminum av náttúrligum ávum, sum sagt varð. Hon var 94 ára gomul.

Lady Bird Johnson var gift við Lyndon B. Johnson, sum var amerikanskur forseti frá 1963 til 1969. Hann var varaforseti hjá John F. Kennedy og tók við, tá Kennedy bleiv myrdur. Lyndon Johnson stillaði upp til forsetavalið í 1964 og bleiv valdur.

Lady Bird Johnson hevur ikki gjørt nógv burtur úr sær tey seinnu árini, men av og á hevur hon tikið lut í almennum tiltøkum.

*Lyndon B. og Lady Bird Johnson*



# Stórur høgguslokkur

**Fólk á avstralsku oynni Tasmania sóu eina rættiliga óvanliga sjón, tá tey gjáramorgunin funnu ein risastóran høgguslokk niðri á sandinum. Hann vísti seg at vera átta metrar langur og vigaði 500 pund. Lívfrøðingar siga, at hetta høgguslokkaslagið livir á millum 250 og 700 favna dýpi sunnan fyri Avstralia og Ný Sæland. Tann størsti, sum er fingin, vigaði 1.000 pund.**

## STUTT SAGT

### Mintust bumbuoffur

Fleiri túsund fólk í indiska býnum Mumbai mintust í gjár tey, sum doyðu í tí ógvusliga bumbuálopinum í býnum fyri júst einum ári síðani. Bumburnar, sum lógu í nøkrum fullsettum ferðamannatokum, kravdu 188 mannalív, og meiri enn 800 fólk vórðu særd. 13 menn, sum eru limir í einum islamskum studentafelagsskapi, eru seinni tiknir fyri at hava verið við til at skipa fyri álopinum, men indiska løgreglan sigur, at 15 aðrir eru ikki funnir enn.

### Ikki til Peru

Myndugleikarnir í Peru hava kravt, at fyrrverandi forsetin, Alberto Fujimori, sum er í Kili, verður útflýggjaður, so hann kann koma fyri rættin. Men í gjár gjørdi ein dómari í Kili av, at Fujimori skal ikki sendast av landinum. Avgerðin er tó neyvan endalig, tí væntandi fara myndugleikarnir í Peru at leggja hana fyri kilska hægstarætt. Alberto Fujimori rýmdi úr Peru í 2000, og síðani hava myndugleikarnir har roynt at fáa fatur á honum, so teir kunnu ákæra hann fyri brot á mannarættindini, svik og onnur lógarbrot.

### 14 mió. flóttar

Sambært amerikonsku flóttafólkanevndini hava tað ongantíð verið so nógv flóttafólk í heiminum sum nú. Ein uppgerð hjá nevndini vísir, at 14 mió. flóttafólk eru í heiminum, og at tað er tvær mió. meiri enn fyri einum ári síðani. Í uppgerðini sæst, at 800.000 fólk flýddu úr Irak í fjør, og av teimum fóru næstan 450.000 til Sýrialands. Nevndin metir, at tað eru meiri enn tvær mió. afghonsk flóttafólk í grannalandinum Pakistan.